# HEILSANIR



**Hey Slættanes fam.**
1.000 takk fyri eina góða og huganliga løtu í bygdarhúsinum á Strondum. Vit ynskja tykkum alt tað besta. Har vesturi næstu ferð?
**Heilsan frá fam. á Strondum**



**Góði Torstein**
Hjartaliga tillukku við 5 ára degnum.
**Heilsan omma og abbi**



**Góða elskaða Ronja**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum 14. febr. Alt tað besta í framtíðini.
**Ynskja mamma og babba**



**Góða Matilda**
Hjartaliga tillukku við 6 ára føðingardegnum.
**Kærar heilsanir omma**



**Góði Høgni**
Hjartaliga tillukku við 11 ára føðingardegnum 14. febr.
**Ynskja mamma, babba, Bartal og Rani**
**PS.** Vónandi vinna tit greipuna í dag



**Góði elskaði Jón Rói**
Hjartaliga tillukku við 2 ára føðingardegnum. Alt tað besta í framtíð tíni. Vit elska teg.
**Heilsan mamma og babba**



**Góða Rannvá**
Hjartaliga tillukku við 13 ára føðingardegi tínum.
**Ynskja mamma, babba, Líggjas og Elsa**



**Góði elskaði babba**
Hjartaliga tillukku við degnum í dag 14. febr. Eg elski teg yvir alt.
**Heilsan Markus**



**Góði Jónas**
Hjartaliga tillukku við tínum fyrsta ári og tínum fyrstu fetum. Tú er tað besta vit eiga.
**Ynskja mamma, babba og diddi**



**Góða elskaða Emma í Århuus**
Hjartaliga tillukku við 3 ára føðingardegnum 15. febr. Jesus pápi signi framtíð tína. Muss og klemm
**Frá ommu og abba á Toftum**



**Góða Emma í Århuus**
Hjartaliga tillukku við 3 ára føðingardegnum 15. febr. Mus og klemm
**Ynskir Wenzil gubbi**



**Góða Amanda**
Hjartaliga tillukku við 10 ára degnum. Vit elska teg.
**Omma og abbi í Vestmanna**



**Góða elskaða Amanda**
Hjartaliga tillukku við 10 ára degnum í dag 14. febr. og alt tað besta í framtíðini. Heilsan vit á Grønlandsvegnum.
**Babba**



**Elskaðu didda og beiggi**
Hjartaliga tillukku við 1 ára døgunum 13. febr. Jesus pápi signi tykkum.
**Ynskja mamma, babba og Arnóra**




Hjartaliga takka vit øllum, ið á ymiskan hátt gleddu okkum á gullbrúðleypsdegnum 16. jan. 2004. Takk fyri blómur, gávur, gjarrit og uppringingar. Eisini til øll tykkum, ið hjálptu og vóru við til at gera dagin so hugnaligan.
**Bestu heilsanir**
**Selma og Byrger**



**Góði Súni**
Hjartaliga tillukku við 17 ára degnum 15. febr.
**Heilsan mamma, babba, Sonny, Ása og Mary**
**PS.** Hans Asbjørn, Pedvør og sviger, tillukku við døgunum 18., 19. og 20. febr.



**Hey fitta Elna**
Hjartaliga til lukku við 8 ára degnum. Her eru Amanda og tú fittar.
**Heilsan Aksel, Ester og Marta**



**Góða fitta Elna**
Hjartaliga til lukku við 8 ára degnum. Tú ert altíð so fitt og røsk. Jesuspápi signi teg. Vit elska teg.
**Ynskja mamma og babba**



# TILTØK

**Gudstænastur Seksagesima**
*Fríðrikskirkjan:* kl. 11, altarg., Meinhard Bjartalíð
*Ellis- og Røktarheimið á Tvøroyri:* kl. 14.30
*Sjúkrahúsið, Tvøroyri:* kl. 16.30 Patrick de Neergaard
*Øravík:* kl. 12, altarg., Jónsvein Bech
*Hvalba:* kl. 12.30,
*Sandvík:* kl. 14, Ólavur Rasmussen
*Havnar kirkja:* kl. 11, Sonja Klein
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Heri Joensen
*Argir:* kl. 11, altarg., Bergur D. Joensen. Talvan gongur í Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi fyri Kirkjuligu Heimamissiónina í Havn
*Argir:* kl. 14 Familjumøti við sunnudagsskúlanum
*Haldórsvík:* kl. 12, altarg., Mogens T. Christensen
*Skála:* kl. 11, altarg.,
*Selatrað:* kl. 17, altarg., Jógvan Fríðriksson
*Miðvágur:* kl. 12, altarg., Inga Poulsen Dam
*Sandavágur:* kl. 12, David Johannesen. Vága Prestagjald – talvan gongur fyri Heimamissiónina
*Christianskirkjan:* kl. 11, Niels Pauli Danielsen. Talvan gongur í Norðoya vestara prestagjaldi fyri kirkjuligu heimamissiónina
*Norðskála:* kl. 17, altarg., Peter O. K. Olofson. Kirkjukaffi aftaná
*Skúvoy:* kl. 12, altarg., Jákup Reinert Hansen. Talvan gongur í Sandoyar prestagjaldi fyri Kirkjuligu Heimamissiónina

*Í Fuglafjarðar prestagjaldi* gongur talvan fyri Kirkjuligu Heimamissiónina
*Í Glyvra prestagjaldi* gongur talvan sunnudagin fyri Heimamissiónina
*Eiðis prestajgjald:* Talvan gongur í øllum kirkjunum fyri Heimamissiónina
*Porkeris kirkja:* Talvan gongur sunnudagin fyri Heimamissiónina.
*Halvórsvíkar kirkja:* Komandi sunnudag gongur talvan fyri Heimamissiónina
*Vestmanna kirkja:* Sunnudagin, sexagesima gongur talvan í Vestmanna kirkju til frama fyri Heimamissiónina

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Mogens T. Christensen presti úr Hvalvík.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.

**Frelsunarherurin, Tórsgøta 19**
Sunnudagin kl. 11 Møti, major Njál Djurhuus talar, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti (sjónvarpsupptøka), major Njál Djurhuus talar. Øll eru vælkomin.
Mánadagin kl. 17 Smáir skótar, kl. 19 Stórar skótar.

**Sjómanskvinnuringurin á Argjum**
kemur saman mánakvøldið kl. 20. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Í morgin kl. 11 Morgunmøti, evnið: Livandigjørd í Kristusi 2. partur. Talari: Ólavur Jacobsen, kl. 11.50 Barnagudstænasta, kl. 16 Samkomufundur.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin. www.filadelfia.fo

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis verður barnaansing. Kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 12 verður eisini møti har Hjørleif Wang úr Kaldbak talar. Kl. 21 Bønar- og lovsongsløta fyri ung í aldrinum 13-19 ár.
Mánakvøldið kl. 19 Ungdómstiltak, sum er ætlað ungdómi (5.-10. flokk).
www.hebron.fo

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Fríggjakvøldið kl. 19 til 20.30 byrjar »Barna- og familjutiltak« við kapping, sangi, leiki o.a.
Leygardagin kl. 17 til 19.15 heldur tiltakið fram í Hoyvíkshøllini. Kl. 20.30 er Ungdómsmøti.
Sunnumorgunin kl. 10.30 til 13.15 heldur tiltakið fram í Hoyvíkshøllini, møti í skúlanum har Jóhan Syderbø talar um evnið: »Náði Guds í lívi Dávids. Á tilbiðjunarmøtinum kl. 12 talar Jógvan Z. um evnið: Bíblian, tónleikur og samkoman. Drekkamunnur er millum møtini.
Týskvøldið samlast húsbólkarnir.
www.livdin.fo

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Martin Olsen.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.
Mikudagin kl. 7 Bønarmøti.
Páskastevna verður í Høllini á Hálsi í døgunum 8. til 12. apríl.

**Missiónshúsið við Landavegin**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli á vanligu støðunum og einki møti.

**Samkoman Rhema**
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20-22 JC Teens – eitt spennandi kvøld fyri ung, har nógv ymiskt er á skránni.
Leygarkvøldið kl. 22 Bønarnátt.
Sunnudagin kl. 17 Møti og sunnudagsskúli.
www.rhema.fo


# VIRKISLEIÐARI

[illegible]

KOVIN seafood



# Politistur

## Eitt arbeiði við avbjóðingum

Politiið er eitt av stóru arbeiðsplássunum í Føroyum. Her hevur tú møguleikan í fullan mun at brúka tínar fakligu royndir og tínar persónligu eginleikar í einum sjálvstøðugum arbeiði við nógvum avbjóðingum og møguleikum at mennast.



*Høvuðsuppgávan hjá politinum er:*

- At vera sjónligt og skapa tryggleika og trygd fyri borgaran og samfelagið
- At fyribyrgja, at ósemjur, ófriður og kriminalitetur íkemur
- At fara eftir, kanna og uppklára framdan kriminalitet
- At tryggja, at galdandi reglur verða hildnar og fyribyrgja, at vanlukkur henda

Politiið hevur til dømis ein høvuðsleiklut í arbeiðinum at fyribyrgja kriminalitet - ikki minst millum børn og ung.

*Grundarlagið fyri politiarbeiðinum er virðing fyri rættartrygdini hjá borgaranum.*

## Eitt arbeiði allan sólarringin

Arbeiðið hjá politinum verður gjørt í tøttum samstarvi í politistaliðnum millum einstøku politistarnar og politistøðirnar.
Her er eitt gott samhald, og arbeiðið byggir á kunnleika til og nýtslu av førleikanum hjá einstaka politistinum fyri at røkka felags málum.
Sum politistur ert tú altíð ein partur av liðnum - um tú ert til arbeiðis ella um tú hevur frí.
Atlitið til borgaran og samfelagið er alla tíðina í miðdeplinum, og tú veitst ongantíð frammanundan, hvat dagurin ella náttin bjóðar



## Løn og útbúgving

Longu frá fyrsta degi sum politistur í royndartíð fært tú eina kappingarføra løn. Harafturat fært tú pensión og ymisk ískoyti fyri tænastu á skiftandi tíðum.
Royndartíðin er umleið 3 ár. Aftaná tað fært tú - um tú ert egnaður til politiarbeiði - fast starv sum politistur.

## Menning og karriera

Sum politistur hevur tú góðar møguleikar fyri eini karrieru. Politið hevur eina røð av serskeiðum - og so eru eisini leiðaraskeiðini fyri politistar, sum hava hug at arbeiða við leiðslu. Harafturat er stór trygd í starvinum og møguleikar at fáa arbeiði innan ymsar deildir ella aðra staðni í landinum.



## Ynskir tú at vera við?

Vit seta eingi formlig krøv um útbúgving ella lívsroyndir fyri at søkja starv hjá politinum. Men vit leggja dent á tínar fyritreytir at verða ein góður politistur, sum kann loysa uppgávurnar hjá politinum í samsvar við reglur og virðir í samfelagnum og við virðing fyri einstaka persóninum og rættindum hansara.

Vit vilja fegin seta fólk í starv, sum ymisliga umboða føroyingin við atliti til sosialt og mentunarligt støði - og vit ynskja eitt hóskandi býti millum kvinnur og menn.

*Treytir sum skulu vera loknar, áðrenn tú søkir:*

- Tú ert fyltur 21 ár
- Tú hevur føroyskan/danskan heimarætt
- Tú hevur góða heilsu, vanliga hoyrn og vanliga litsjón
- Tú hevur koyrikort til persónbil

**Meira kunning**

Tey, ið ynskja meira at vita, kunnu venda sær til politistøðina á staðnum, ella politistøðina í Tórshavn, at fáa vegleiðing, spurningar svaraðar og kunningartilfar útflýggjað ella sent.

**Føroya Landfúti**
Politistøðin
Jónas Broncksgøta 17
Postsmoga 3018
FO-110 Tórshavn
Tlf. 35 1448 fax. 35 1449
Heimasíða: www.politi.fo

Umsóknir kunnu sendast inn alt árið, og verða upptøkuroyndir eftir tørvi. 3 politistar skulu setast heystið 2004.
Umsóknarfreistin til hesa upptøkuroyndina er 15.03.2004